## Mentamálaráðið
MENTAMÁLADEILDIN

## FULLTRÚI

**Eitt áhugavert, fjølbroytt og sjálvstøðugt starv sum fulltrúi er leyst at søkja í Mentamáladeildini**

sansir.fo

**Starvið**
Høvuðsuppgávurnar hjá fulltrúanum eru m.a.:
- At fyrisita, tryggja menning og samstarv og at røkja samskiftið við stovnar og øki undir Mentamáladeildini og taka sær av málsviðgerð í hesum sambandi
- At arbeiða við verkætlanum og uppgávum
- At ráðgeva og vegleiða í spurningum innan økið, tilevna uppskot til lógir, kunngerðir, reglur o.a.
- At umsita virkisøki, sum verða løgd til fulltrúan
- At taka lut í arbeiðsbólkum
- At taka sær av málsviðgerð sum heild
- At røkja aðrar fyrisitingarligar uppgávur.

Fulltrúin skal tryggja, at nevndu uppgávur verða loystar á einum høgum fakligum stigi, og at mannagongdirnar eru í samsvar við nútímans krøv.

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal:
- Hava útbúgving frá lærdum háskúla
- Kunna arbeiða sjálvstøðugt umframt samstarva í arbeiðsbólkum o.l.
- Vera tænastusinnaður, fyrikomandi og hava góð samstarvsevni
- Dáma avbjóðingar og hava vilja til at royna nýggjar leiðir

**Vit bjóða**
Starvið er spennandi við skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti inn- og úteftir. Arbeiðið er á einum høgum fakligum stigi, og møguleikarnir fyri bæði persónligari og fakligari menning eru góðir.

Mentamálaráðið arbeiðir við elektroniskari skjalahandfaring, og er fyrisitingin tí pappírsleys. Upplæring fæst í hesi skipan.

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøkið fevnir um stjórnarráðini, Løgmansskrivstovuna og deildir teirra.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum, c.v. o.ø. skulu sendast til:

**Mentamálaráðið**
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn

ella til t-post: mmr@mmr.fo

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 23. februar 2007, kl. 16.00.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú teg í samband við Jóannes Dalsgaard, deildarstjóra, á tlf. 35 50 50 ella 55 50 35.

Eisini ber til at vitja heimasíðu okkara **www.mmr.fo**.

**Mentamálaráðið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi. Mentamálaráðið er skipað í tríggjar deildir – Mentamáladeild, Fólkaskúladeild og Vinnu- og miðnámsskúladeild – umframt ein stáp, sum veitir ráðgeving til deildirnar o.o.
**Mentamáladeildin** hevur fyrisitingina av hægri útbúgvingum, gransking, mentamálum, søvnum, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi. Harafturat fyrisitur deildin ávísar uppgávur viðvíkjandi kirkjuni.

GRINDAMANNAFELAGID
1993 1584

# Aðalfundur

Aðalfundurin verður í Norðurlandahúsinun leygardagin tann 24. mars 2007 kl. 13:30 við hesi skrá:

1. Frágreiðing frá virki felagsins í farna ári
2. Grannskoðaður roknskapur verður lagdur fram
3. Val av tveimum nevndarlimum
4. Val av grannskoðara
5. Ásetan av limagjaldi
6. Innkomin mál
7. Ymiskt

Gjørt verður vart við, at mál, sum ynskjast viðgjørd sambært pkt. 6, skulu vera nevndini í hendi seinasta lagi 7 dagar fyri aðalfundin.

Aðalfundurin er almennur.

Høvi er altíð hjá áhugaðum at gerast limir.

**Nevndin fyri Grindamannafelagið**
Fútalág 40 - 100 Tórshavn

## Volvo FH 12 lastbilur

Hevur "veksel lad" system til 7,85, 7,15 og kont. lás.
Lastin er 7,85x2,70 v/gardinum
Bilurin hevur oljufýr v/m og er annars í góðum standi
Árgang 1995
Prísur 100.000,- +mvg.

*Tlf. 21 11 11*


**RUKO LÁSATÆNASTA**
Ruko



- Umleggja alt til sama lykil
- Vit kopiera lyklar
- Útvega allar lásakassar
- Útvega lásasystem

Vit eru serkønir á økinum

VALDEMAR LÜTZEN BYGGIBÚÐ · *TÍN BYGGIBÚÐ OG LÁSATÆNASTA*
SKÁLATRØÐ 14 · TÓRSHAVN · TEL 30 10 20



**LOYSNIN!**

**...ein lykil til alt húsið, virkið ella skúlan !!**

**Vit loysa lás- og lyklatrupulleikar.**

**Vit eru serkønir í at gera:**

Ruko systemlás · Skipan av lásum
Umvælingar · Skera lyklar til · Umskipa

**TÓRSHAVNAR LÁSASERVICE**
v/Jahn Petersen
**TEL 310 411 · FARTEL 215 411**
teldupostur: lasasmid@post.olivant.fo

***Arbeiðshandskar***
***til øll endamál - bæði á sjógvi og landi***

Beinleiðis frá framleiðara



**Landsins størsta úrval**
frá eingangshandskum til fóðraðar Japan-handskar

ADC-Heilsølan spf
Láarvegur 14 • 100 Tórshavn • Tel. 315828 • Fax 315893
adc@adc.fo

Sosialurin 311820